

Nr. 7 ***28. mars 2027*** **87. árg.**





Langifríggjadagur

Jesus doyr á krossinum

„Øðrum hevur hann bjargað, men sær sjálvum er hann ikki mentur at bjarga!“ Mark. 15,31.

Jesus mátti sjálvur bera kross sín út á Golgata, og tað var als ikki løgið, at hann hoknaði undir hesi byrði.

Teir vóru farnir illa við honum! Teir høvdu sligið hann við knýttum nevum, við sevleggjum og einum jarnrøri. Teir høvdu bart hann við ræðslu-koyrlinum, so blóðið rann, og trýst tornakrúnuna niður yvir pannu hansara!

Tá ið krossurin var reistur har úti, hildu teir á við óndskapi sínum at háða og spotta tann heilaga og reina – meðan Jesus bað fyri teimum:

„Faðir, fyrigev teimum; tí at teir vita ikki, hvat teir gera!“

Men tað var eisini okkurt annað, teir ikki vistu. Nevniliga at tað, sum sá út sum ein ósigur, í veruleikanum var ein stórur sigur. Ja, størsti sigurin, sum nakrantíð er vunnin á hesi jørð! Sigurin yvir Sátani og syndini! Her úti á Golgata læt Jesus páradísportrið upp fyri syndarum – við egna blóði sínum!

Men tað skiltu teir als ikki! Og tá ið teir søgdu: „Øðrum hevur hann bjargað (frelst), men sær sjálvum er hann ikki mentur at bjarga (frelsa)!“ søgdu teir ein undurfullan sannleika, uttan at teir sjálvir vistu av tí.

Aðrar hevur hann frelst! Ja, nettupp! Og annar ránsmaðurin var hin fyrsti, sum gekk inn gjøgnum frelsunnar opnu dyr!

Seg sjálvan er hann ikki mentur at frelsa! Nei, tað kundi hann ikki! Tí um hann skuldi frelsa okkum, mátti hann doyggja

sjálvur. Hann doyði í okkara stað. Hann „setti lív sítt til fyri seyðirnar“. Við blóði sínum rindaði hann fyri synd heimsins – eisini fyri tína og mína synd.

Men ránsmaðurin fekk jú ikki stundir at betra seg og taka annað skinn um bak. Hann kundi ikki so mikið sum halda saman hendur í bøn. Hvussu kundi hann so blíva frelstur?

„Jesus, minst tú til mín, tá ið tú kemur í ríki títt!“ Soleiðis ljóðaði einfalda bøn hansara. Og Jesus svaraði: „Sanniliga sigi eg tær, í dag skalt tú vera við mær í Páradís!“

So einfalt er tað, er tað ikki undurfult!

Vilhelm Munch – Effie Campbell umsetti.

Hin leitandi Frelsarin

„Hvør tykkara, sum hevur 100 seyðir og hevur
mist ein teirra, letur ikki teir 99 vera eftir í haganum
og fer at leita eftir tí burturmista, inntil hann finnur hann?
Og tá ið hann hevur funnið hann,
leggur hann hann fegin á herðarnar.“
Luk. 15,4–5.

Eg eigi eina bók, sum hevur eitt løgið navn: „Gud ja! Men Jesus?“ Tað løgna er, at tað eru menniskju, sum trúgva á Gud, men einki leggja í Jesus. Men tað ræðuligasta av øllum hevði verið at møtt Gudi – uttan um Jesus, og uttan at standa reinsaður í Jesu blóði.

Tann, sum vendir Jesusi bakið, vendir bakið til Guds og Himmalin – og verður glataður í ævir!

Tí, tað er bara frelsa í Jesu navni eina!

Farisearnir og teir skriftlærdu søgdu eisini ja til Guds – men nei til Jesusar! Eingin bað so ofta til Guds og las so íðin í Bíbliuni sum teir. Kortini hataðu teir Jesus. Og fyri at dálka góða navn hansara og umdømi eyknevndu teir hann „syndara vinur“.

Men hugsa tær, hvat eitt undurfult navn hetta gjørdist fyri allar syndarar!

Ja, hetta bleiv eitt heiðursnavn hjá Jesusi! Hann var jú nettupp komin at frelsa syndarar – og fyri at teir rættiliga skuldu skilja tað, segði hann teimum søguna um teir 100 seyðirnar. Hann greiddi frá teimum 99, sum lógu tryggir í rættini, og um hin eina, sum var burturvilstur, og so segði hann frá, hvussu hirðin

leitaði eftir honum, til hann fann hann, og hvussu hann bar hann heim við gleði.

Hatta er ein undurfull mynd av Jesusi – kanna hana ógvuliga gjølla!

Hann gjørdist ikki argur og klípti seyðin í beinið ella sló hann í illsinni. Hann gav ikki ilt av sær, av tí at hesin tápuligi seyðurin var runnin sínar egnu leiðir. Nei, hann var bara glaður, hann tosaði blídliga og eymt við hann.

Varisliga lyfti hann hann upp á herðarnar og bar hann heim við gleði!

Akkurát soleiðis er Jesus! Hann verður glaður! Tað verður gleði í Himli – og tú verður glaður, um hann sleppur at bera teg heim til sín! Ja, ein og hvør, sum trýr á Jesus, syndara vin, verður glaður og sælur! Og eingin munur er, um vit eru lítil ella stór.

Vilhelm Munch – Effie Campbell týddi.

Friðurin

William Gladstone, ein hin størsti forsætisráðharri í Onglandi, var ein góður kristin maður, sum tænti Harranum. Á vegginum í sovikamari hansara hekk ein broderað mynd við tekstinum: „Tann, ið hevur grundfest sinni, letur Tú altíð hava frið, tí á Teg lítur hann!“ (Jes. 26,3 V.D.)

Tað var hitt fyrsta, Gladstone sá, tá ið hann vaknaði á morgni, og tað seinasta, hann sá, tá ið hann fór til songar á kvøldi. Har liggur lykilin til frið! Vit kunnu uppliva henda friðin, tí vit vita, at Hann, vit savna tankar okkara um, er Hann, sum samvirkar allar lutir til góða hjá teimum, sum elska Gud.

Effie Campbell umsetti.

Friðurin, sum ber av øllum viti

Tá ið vit leggja okkara trupulleikar í Guds hendur, leggur Hann sín frið í okkara hjørtu.

Grem teg ikki um tað, sum tú ikki fekst gjørt í dag. Gud vil geva tær møguleikar at gera tað í morgin.

Góðtak náði Hansara í kvøld, sig Honum um allar stúranir tínar og sov so við Hansara friði.

AMEN!

e.c. ums.

Tungan

Tá ið Dávid verður jagstraður uppi í fjøllunum, far tú so ikki upp í herliðið hjá Sáuli at fella ein ósekan mann, tí Sául fer at falla fyri Dávidi. Tá ið Jósef verður skarndálkaður, og Dánjal verður førdur til leyvubølið, tá ið Háman hevur reist gálga sín, og verðin hevur reist sín kross, far tú so ikki upp í fjøldina, sum rópar: „Krossfest! Krossfest!“ Men tú skalt vera stillur fyri Harranum og bíða eftir Honum! Krossurin verður ofta ein trappa upp til trónuna. Øvund og útspillan eru líka so fremmand fyri einum heilagum lívi, sum glóðin í junisólini fyri einum fiski. Okkara frumevni, okkara umhvørvi er Gud, og Gud er kærleiki. Kava niður í hansara undurfulla og óendaliga kærleikshav. Hann hevur eitt stórt hjarta fyri børnum sínum. Tú ert eygnasteinur hansara. Víst kanst tú smíla undir eygnabrúm morgunroðans.

Effie Campbell umsetti.

Sjálvt hitt allarminsta

Einaferð, tá ið gudstænasta skuldi vera, skrivaði deknurin skeivt sálmanummar upp. Av hesum varð sálmurin „Hjerte, lad dig ej indbilde, at du er af Gud forstødt“ sungin – og varð til frelsu fyri eina niðurtyngda sál. Gud okkara kann eisini brúka teir ytru lutirnar – eisini teir allarminstu – í síni frelsuætlan.

„Et Ord med på Vejen“. – Effie Campbell umsetti.

Tá ið vit leggja okkara trupulleikar í Guds hendur, leggur Hann sín frið í okkara hjørtu. – Grem teg ikki um tað, sum tú ikki fekst gjørt í dag. Gud vil geva tær møguleikar at gera tað í morgin. – Góðtak náði hansara í kvøld, sig Honum um allar stúranir tínar og sov so við Hansara friði. AMEN!


e.c. ums.

Sunnudagsblaðið er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

SUNNUDAGSSKÚLIN

28. mars	**Tekstur: 2. páskadagur,** Luk. 24,13-35	**Bíbliuorð:**	Luk. 24,34b
4. apríl	**Tekstur:** Dóm. 6,1-3+11-16+25-31	**Bíbliuorð:**	Dóm. 6,16b ella 5 Mós. 31,8

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
Umbróting & prent: Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74



Nr. 8 ***11. apríl 2027*** **87. árg.**

Gud tosar tibetanskt

Johan Hovda

Søgan um, hvussu Bíblian varð týdd (1856–1948), verður greitt frá í bókini hjá Allan Maberly „God spoke tibetan". Á norskum eitur henda bók „Heltedåd i Tibets fjellverden", og bókin er tøk á netinum á www.nb.no

Yoseb Gergan var sonur ein fyrrverandi fíggjarmálaráðharra, Tempu Gergan, sum noyddist at flýggja úr Lhasa vegna falskar ákærur. Teir ákærdu hann fyri at hava gjørt av við tann Dalai Lama, sum var samtíðarmaður hansara. Tempu búsettist í Luba-dalinum norðan fyri høvuðsstaðin, Leh, í tí sum teir kallaðu „Little Tibet", sum er tann indiski parturin av Kashmir.

Yoseb skuldi yvirtaka handilsfyritøkuna eftir pápan, men á ungum árum droymdi hann eina náttina, at ein karavan við múldýrum steðgaði uttan fyri hansara dyr við fínum og dýrum vørum úr Kina og Nepal. Handilsmenninir søgdu, at hetta vóru hansara skattir, og meir fór at koma.

Yoseb vaknaði av hesum dreymi, men sovnaði aftur og fór aftur at droyma. Hesa ferð var hann í einari fátæksligari kirkju, og ein maður las úr Bíbliuni á tibetanskum. Síðurnar vóru skrivaðar við eldbókstøvum.

Hann kendi røddina á talaranum aftur sum egnu rødd sína. Fólkini lurtaðu væl eftir. So hoyrdist ein rødd: „Hvønn veg velur tú, vinur mín? Annar bjóðar ríkidømi og luksus, men onga vón um ævigt lív. Hin vegurin er harður, men førir til ein bý úr gulli og ævigari gleði.

Ein týskari, Heinrich Jaeche, týddi Jóhannesarevangeliið (1856–1862). Men tað fekk lítla útbreiðslu og var ringt at skilja.

Yoseb Gergan fer undir at týða Nýggja Testamenti, sum verður liðugt í 1903, og so týðir hann alla Bíbliuna, sum er liðug í 1935.

Søgan vísir okkum, at tá ið Guds orð verður týtt, verður altíð eitt andaligt stríð. Tað er áhugavert at lesa um, hvussu nógv ógvisligt hendir, áðrenn tær fyrstu 5.000 Bíbliurnar at enda verða prentaðar í 1948.

Effie Campbell umsetti.

At trúgva tí ótrúliga

Um tú hevur stríðst við at trúgva tí undursama, ert tú ikki einsamallur. Sjálvt trúarkempurnar stríddust við vantrúgv. Ábraham var nóg skilagóður at fata, at lívssøra kona hansara ikki fór at føða nakað avkom, og hann setti spurnartekin við lyftið, sum Gud hevði givið honum.

Gud hevði sagt, at eitt stórt fólk skuldi koma frá honum, staðin fyri at hava at honum segði Gud við hann: „Lít upp móti himni og vita, um tú fært talt stjørnurnar har!“ (1. Mós. 15,5).

Stjørnurnar eru alt ov nógvar í tali, at nakar kann telja tær, men tað var meiningin við Guds venjing: Ábrahami tørvaði at verða mintur á Guds óendaligu skapanarmegi.

Effie Campbell umsetti.

Sí, tað Guds lambið

Martin Luther

Sí, tað Guds lambið, sum ber synd heimsins. Gud sigur: „Eg veit, at syndir tínar eru alt ov tungar hjá tær at bera. Hygg, tí vil eg leggja tær yvir á mítt lamb og taka tær burtur frá tær. Trúgv bara hesum! Tí tá ið tú gert tað, so ert tú fríur frá syndini. Syndin hevur bara tvey støð, har hon kann vera: Annaðhvørt er hon hjá tær og liggur um hálsin á tær, ella eisini liggur hon á Kristusi, Gudslambinum. Liggur hon nú á tínum ryggi, ert tú glataður; men tá ið hon hvílir á Kristusi, so ert tú fríur frá henni og verður sælur.

Vel nú, hvat tú vilt! Sambært lóg og rætti átti tað at verið so, at syndin bleiv hjá tær. Men av náði er hon vorðin blakað á Kristus, Lambið.

Effie Campbell umsetti.

Guds trúfesti

Svein E. Andersen

„Eisini tá ið tú sigur, at tú sært
Hann ikki, er tín søk fyri ásjón Hansara…“ Job 35,14.

Sum hetta er eitt ótrúligt lyfti fyri øll okkum, sum hóast nýpussaðar brillur, ofta ikki kunnu síggja Hann ella merkja, hvussu nær Hann er øllum, sum ákalla Hann!

Eitt av fyrstu minnum mínum um bønarsvar, er bønin um tað „dagliga breyðið!“ Eg hoyrdi, hvussu mamma bað við tárum um kvøldarnar, tá ið hon helt, at vit børn svóvu. Pápi var ferðandi trúboðari, og lønin var ofta hálvvánalig. Tá bað mamma, eftir at hon hevði brúkt allar møguleikar úr náttúruni og urtagarðinum – og tjú hei – dagin eftir stóð ein matkurv á trappuni, ella tað lá ein brævbjálvi við ektaðum pengaseðlum í postkassanum – brádliga er bønarsvar!

Seinni í lívinum havi eg fleiri ferðir brádliga fingið bønarsvar. Eg var nýfrelstur, hevði ein gamlan bil og bara pengar at keypa mær 2 litrar av bensini. Brádliga er tað ein systir í Harranum, sum fær eina áminning. Hon rennur frá arbeiðsplássi sínum yvir til Essostøðina og rindar fyri fullan tanga!

Ella tá ið vit sum ungir trúboðarar búðu í Hong Kong við tveimum børnum. Vit høvdu brúkt allar okkara pengar og gávur, sum fólk høvdu sent okkum, og nú vóru vit í stórari penganeyð. Vit ætlaðu at ringja til foreldur okkara og biðja tey læna okkum pengar til flogferðaseðlar heim – og tjú hei, tá lá ein kekkur í postkassanum, sum nøktaði allan okkara tørv í 6 mánaðir framyvir!

Ferð eftir ferð í tey 40 árini, sum eru farin, síðani vit byrjaðu „Hermon Forlaget“, hava vit verið í støðum, sum menniskjansliga mett vóru „ógjørligar“. Viðhvørt vóru avbjóðingarnar komnar av tí, at vit sjálv høvdu gjørt okkurt mistak, í øðrum førum vóru tað onnur, sum elvdu til trupulleikarnar – ella av heimsstøðum sum í gjaldoyrakreppuni og Kovid –19.

Ófullkomin menniskju og penganeyð kunnu geva tær tunga mótbrekku, og har … tá ið tað tykist, sum eingin vón er, eisini TÁ sær Hann teg, og tjú hei, so kemur ónatúrlig hjálp og vísdómur at loysa trupulleikan viðvíkjandi tí „Goliati“, tú stendur yvirfyri.

Effie Campbell umsetti.

IKKI TÆR FEITU YVIRSKRIFTIR

Nóa hevði helst ikki fingið tær feitu yvirskriftirnar í bløðunum. Bíbliukønir menn halda, at hann bygdi ørkina í 120 ár. Í 2. Pæt. 2,5 lesa vit, hvussu hann prædikaði fyri teimum gudleysu, at Guds rættvísi dómur fór at koma. Men bara 8 sálir fóru inn í ørkina og blivu frelstar. Tað kann tykjast at vera eitt soltið úrslit.

MEN HANN SUM HÚSFAÐIR FEKK ALLA SÍNA FAMILJU FRELSTA!

Tað er hóast alt tað týdningarmesta. Hugsa tær, um allar familjur kundu tað? Brúkar tú tíð saman við tínari familju? Gert tú „íløgur" í tær dýrabaru sálirnar? Mátti tað verið so, at vit upp á tann eina dag kundu sagt: „Harri, her eri eg og øll tey, sum tú hevur givið mær." Mátti tað verið so, at talið er fult, tá ið vit sita við brúdleypsborð Lambsins í Himli, at eingin hjá okkum manglar.

Effie Campbell.

Umvending

F. Wisløff

Jesus bíðar bara eftir, at syndarar skulu venda um til hansara. Náði hansara er so stór, at ikki bara Djevulin, men eisini tey heilagu og gudrøknu viðhvørt halda, at tað gongur út um alt mark.

Tey líkjast Jónasi, sum var illa við, av tí at Harrin ikki beindi fyri Nineve. Fyri Gudi er eingin synd so stór, at hann ikki vil fyrigeva. Hann vil kasta allar syndir okkara í havsins dýpi, og havið fjalir ikki bara klettar, men eisini stór fjøll. Gud letur syndina vera so langt burtur frá okkum, sum eystur er frá vestri. Hann strikar syndir okkara, sum tá ið hann fær mjørkan at lætta.

Effie Campbell umsetti.

Sunnudagsblaðið er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

SUNNUDAGSSKÚLIN

11. apríl	**Tekstur:** Dóm. 7,1-4+9-21	**Bíbliuorð:** Jes. 41,10
18. apríl	**Tekstur:** Rut, 1,1-5+16; 2,11-12 ;4,9	**Bíbliuorð:** Jes. 49,15d-16a

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
Umbróting & prent: Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74